VIÐMERKINGAR

# Almenni búskapurin uttan mál og strategi

Reidar Nónfjall



Landsstýrið hevur ikki, nú vit skriva ár 2005. sett eina greiða búskapar-strategi fyri tað almenna, hvørki uppá styttri ella longri sikt. Hetta sæst nú týðuliga aftur við m.a. hallinum á fíggjarlógini fyri 2004. Eftir leys-ligum framrokningum um inntøkur og útreiðslur, er nógv, sum bendir á, alt annað líka, at hetta hall økist munandi í 2005 og 2006.

Eitt hall á fíggjarlógini uppá 3-7% av BTÙ eigur at seta allar ávar-ingar-lampur at lýsa hjá landsstýrinum og er at meta sum eitt vandamál. Tað er ikki bara hall í sær sjálvum og fígg-ingin av einum halli, sum er kritiskt - tað er líka nógv vantandi raðfesting av rakstrarútreiðslum og íløg-um, herundir at alt ov stórar fíggjarligar bindingar verða gjørdar í "skeivar" rakstrar-útreiðslur, sum minka um møguleikarnar at økja vælstandin í samfelagnum.

**Búskaparliga útgangs-støðið 2005 - krepputekin**

Fíggjarliga orkan hjá tí almenna er nógv tengd at vinnuliga virkseminum í samfelagnum. Tí eigur fíggjarpolitikkurin at taka hædd fyri búskaparligu gongdini, úrslitunum og út-litunum í vinnuni.

Búskaparliga støðan í Føroyum er nógv merkt av stagnatión og niðurgongd. Greið krepputekin eru í føroyska búskapinum, eitt nú hevði landskassin eitt hall á fíggjarlógini 2004 uppá 152 mió.kr og fiska-virkini á landi høvdu eitt hall uppá 25 mió.kr. í 2004. Um so er, at ongi tiltøk verða sett í verk at fremja skerjingar í almennum tæn-astum og bygnaðarligar umleggingar innan allan tann almenna sektorin, eru útlitini fyri 2005 og 2006 vánalig, og roknast kann tá við einum halli uppá 300-700 mió.kr. á fíggjarlógini, svarandi til umleið 3-7% av BTÙ. Til samanberingar kann nevnast, at danska fíggjar-lógin vantandi fer at vísa eitt avlop uppá 1,8% av BNP í 2005. Útlitini fyri danska búskapin eru ein solid búskaparlig fram-gongd við stórum vøkstri í vinnuíløgum og vøkstri í útflutninginum. Sama bú-skaparliga framgongdin ger seg galdandi í Svøríki og Norra

Politiskt eru ongi tekin um, at henda álvarsliga bú-skapargongdin í Føroyum hevur ávirkan á førda bú-skaparpolitikkin og onnur politikkir hjá tí almenna - tað koma als ongi signalir til leiðslur og borgarar, um nakað at rætta seg eftir. Tað er eisini sera óheppið, at tá so tiltøk langt um leingi verða sett í verk, ja so verða eisini vælvirkandi tænastur raktar og lagdar í sorl.

Tað er vanligt og náttúr-ligt, tá lond eru á veg í krepputíðir og í krepputíð-um, at framd verða tiltøk og rationaliseringar innan tað almenna. Í kreppuárunum í Føroyum í tíðarskeiðnum 1991-1995, vórðu hesar uppgávur loystar og dikter-aðar av donskum embætis--monnum og serfrøðingum frá IMF. Í hesum sama tíðarskeiði vórðu allar før-oyskar kommunur settar undir umsiting av lands-stýrinum.

Spurningurin er um før-oyskir politikarar hava leiðsluligan førleika og dirvi at útinna kreppu-leiðslu, tvs. skapa ella tryggja stabilitet í samfe-lagnum í einari slíkari álv-arsligi støðu, sum er íkomin í føroyska búskap-inum. Søgan vísir, at tað hava teir ikki og tí er øll orsøk til at fata hesa bú-skaparligu gongdina og støðuna sum sera álvars-liga. Vantandi politisk út-spæl og ongi búskapar-politisk mál kunnu seta enn meira ferð á eina kreppu-tilgongd.

**Búskaparpolitisk mál og amboð**

Tað er í løtuni ikki gjørligt at síggja, hvørji fíggjar-politisk mál landsstýrið hevur sett sær og hvussu fíggjarpolitisku amboðini verða brúkt.

Fíggjarlógin er høvuðs-amboðið hjá politisku myndugleikunum at útinna ætlaða fíggjarpolitikkin. Á fíggjarlógini eigur td. at síggjast, hvussu útreiðslu-bygnaðurin hjá tí almenna politisk verður ásettur og hvørji mál eru sett til inn-rættingina av almenna sek-torinum uppá styttri og longri sikt. Fíggjarlógin skal eisini vísa og innihalda mál um, hvussu landið út-vegar sær inntøkur í løtuni og uppá longri sikt.

Tað eru hundratals kontoir á fíggjarlógini, sum ávirka búskaparligu gongd-ina hvør í sínum lagi ella hava onga tænastuliga ávirkan, eru óneyðugar ella eru gloymdar. Tí er neyð-ugt, at tað fyrst verða løgd mál og strategi fyri al-menna sektorin (land og kommunur), og at hetta sæst aftur í innihaldinum í árligu fíggjarlógini og tí planlegging, sum fer fram í tí sambandi, og síðan tí stýring sum byrjar 1. januar á hvørjum ári. Tað fyriligg-ur í Føroyum eitt nú ongin langsiktað rakstrarætlan og íløguætlan fyri land og kommunur, sum politiskt verður fylgd. Eitt valskeið er ikki nóg mikið strateg-iskt at arbeiða útfrá í einum samfelag og einari dynam-iskari umverð.

Búskaparpolitisku málini eru vanliga:

- Búskaparligur vøkstur (nýggjar vinnur, økt pro-duktión, virðisøking o.a.)
- Øll í arbeiði (burtursæð frá td. friktiónsarbeiðs-loysi og konjunkturar-beiðsloysi)
- Prísstabilitetur (lág infla-tión)
- Javnvág á gjaldsjavnan-um
- Umhvørvi - herundir um-sitingin av okkara til-feingi.

Tað ber ikki til at náa øllum hesum málum til fulnar samstundis. Tí má gerast eitt politiskt val og rað-festing útfrá galdandi for-treytum, um hvørji av mál-unum eiga at veljast og raðfestast ovaligari enn onnur og innan hvat tíðar-skeið. Nøkur av málunum taka longri tíð enn onnur at gjøgnumføra, og ymiskt er, hvørji amboð eiga at brúk-ast til at náa málunum. Skal td. tað almenna verða við til at seta gongd á búskap-arliga vøksturin og nær, hvussu leingi, á hvønn hátt og í hvussu stóran mun.

Hetta eru tey generellu málini, sum onnur deilmál eiga at setast útfrá. Hetta merkir, at skal tað almenna td. verða við til at skunda undir búskaparligan vøkst-ur kann hetta gerast við selektivum skipanum og tiltøkum, sum møguliga kunnu avmarkast og avtak-ast eftir tilætlað úrslit. Tryggjast kann, at bara al-mennar lønartungar íløgur verða settar í verk, sum skapa nógv arbeiðspláss og fortreytir fyri at menna verandi og nýggjar vinnur.

<u>Búskaparligur vøkstur</u>

Tað eru nakrir undirliggj-andi faktorar, sum ávirka búskaparliga vøksturin - sonevndir drivarir. Hesir kunnu td. verða vinnulig førleikamenning hjá leiðsl-um og starvsfólkum í vinn-uni, vinnulig nýskapan, íverksetaraskipanir, glo-balisering og informations-og kommunika-tiónstøkni (ICT).

Landsstýrið eigur skjót-ast gjørligt at leggja eina langsiktaða strategi fyri búskaparliga vøksturin.

Viðmerkjast kann, at td. lægri persónskatturin í 2005 hevur onga effekt havt ella fer at fáa á bú-skaparliga vøksturin ella skapa arbeiðspláss. Henda skattalækking í 2005 hevur havt við sær, at privata nýtslan er økt og tilsvarandi er innflutningurin øktur eftir hesum nýtsluvørum - innlendski eftirspurningur hevur ikki havt við sær hægri íløgur og stovnan av fleiri virkjum í útflutnings-vinnuni. Langsiktaða ávirk-anin av skattalættanum, alt annað líka, er stórt hall á fíggjarlógini.

Hinvegin hevði tað givið meining, at td. partafelags-skatturin varð settur til 0% komandi 5-10 árini. Hetta hevði havt við sær, at føroysku virkini betri kundu kappast um menning av nýggjum vørur og tæn-astum og landskassin fekk aftur inntøkur frá skatti av lønum.

<u>Øll í arbeiði</u>

Í Føroyum er nakað, sum bendir á, at vit komandi árini hava fingið eitt struk-turelt arbeiðsloysi, tvs. har tað ikki uttan víðari ber til at flyta fólk úr einari vinnu í eina aðra (tað eru ongar nýggjar vinnur og talan er oftast um at flyta ófaklærda arbeiðsmegi, sum skal skúlast, áðrenn henda kann brúkast í meira vitanar-tungum vinnum). Hetta eigur tað almenna at taka hædd fyri í langsiktaða fíggjarpoltikkinum, eitt nú at steðga stuðli til vónleys projektir og skipanir, men heldur skapa betri karmar og skipanir, fyri eitt nú íverksetarar, sum kunnu skapa nýggjar útflutnings-vinnur og arbeiðspláss.

<u>Prísstabilitetur (lág inflatión)</u>

Tað almenna eigur ikki at ganga undan í at hækka prísirnar á framleiðslufak-torunum í samfelagnum (løn) - tí vanliga verður hetta gjørt uttan tilsvarandi vøkstur í produktivitetinum ella hægri góðsku. Før-oyskar vørur og tænastur hava í flestu førum lutfals-liga ikki stórt vitanarinni-hald og kappast á markn-aðum við "deyðiligari" kapping, har ávísir faktorar kunnu hava avgerðandi týdning fyri at klára seg. Tí er neyðugt at vísa aftur-haldi í lønarvøkstrinum, so leingi vit ikki kunnu selja aðrar vitanartungar vørur og tænastur, sum geva nógv av sær í lønum til framúr kompententar leiðslur og starvsfólk.

<u>Umhvørvi - umsiting av tilfeingi</u>

Fiskivinnan er høvuðsvinna í Føroyum og tí er neyðugt at fara væl um henda partin av ríkidøminum, her verður hugsað um veiðutrýst og dálking av havumhvørvin-um.

**Ekspansivur kontra kontraktivur fíggjar-politikkur**

Tað er onki í vegin fyri, at tað almenna ella landsstýr-ið velur at brúka fíggjar-politikkin til at ávirka og stýra einari ynskiligari bú-skaparligari gongd. Tað er kortini ógjørligt at síggja í løtuni, hvat slag av poli-tikki veruliga verður førdur - í løtuni verður førdur ein fíggjarpolitikkur, sum minnir um ekspansivan fíggjarpolitikk við halli á fíggjarlógini, men uttan mið og mál. Kunnu vit so næsta ár roknað við tí øvugta ella einum kon-traktivum fíggjarpolitikki, og hvørjar avleiðingar fær tað.

**Yvirtøkur av málsøkjum og nýggjar útreiðslur**

Landsstýrið hevur sett sær fyri at yvirtaka nýggj máls-økir frá danska statinum, eitt nú kirkjan, løgregla o.a. Samstundis er ríkisveiting-in minkað við 30%. Hetta eigur at leggjast oman á hallini á fíggjarlógini.

**Sterkari búskaparlig stýringarambað hjá tí almenna**

Landsstýrið eigur at leggja fyri Føroya Løgting eina broyting í stýrisskipanar-lógini, sum ásetur, at lands-stýrið, sum útgangspunkt, ikki fær loyvi at leggja fyri tingið eina fíggjarlóg fyri landskassan, sum gevur hall. Um so er, at lands-stýrið ætlar at leggja eina fíggjarlóg við halli fyri løgtingið, skal hetta gerst við serligum grundgeving-um og saman við ítøkju-ligum ætlanum um, hvussu búskapurin kemur í rættlag aftur.

Harafturat eigur at áset-ast í stýrísskipanarlógini eitt hámark fyri skuldar-bining av landskassanum.

Samanumtikið eigur landsstýrið at leggja eina langsiktaða búskaparstra-tegi fyri almenna sektor-in, herundir eisini fígjarliga virksemi í føroysku komm-unum. Møguleikarnir fyri rationaliseringum og um-legginum innan almenna sektorin eru nógvir, men tað hastar.

## Shakin' Stevens vinnur sjón-varpskapping

SUMMAR-FESTIVALURIN

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Shakin' Stevens vann leygarkvøldið kapping-ina "Hit me baby one more time" á ITV1. Hetta er ein kapping fyri tónleikarar, sum plagdu at vera kendir. Tey, sum Shakin' kapp-aðist ímóti í finaluni, vóru diskobólkurin Shalamar and boy-bandið 911, The one and only Chesney Hawkes, Carol Decker, Tiffany, og Hue &Cry.

Ein fyrrverandi stjørna úr 70' ella 80'árunum kom víðari í hvørjum undanumfari, og leygarkvøldið vóru tað hesi, sum hittust í finaluni. Tey spældu sítt kendasta lag og eina tolking av einum nýggj-um lag. Hyggjararnir valdu so vinnaran. Shakin' Stevens luttók við klassikaranum "This ole house" og eini tolking av lagnum "Trouble" hjá Pink. Tað var nóg mikið til at vinna hjørtuni á áhoyr-arunum. Løgini, sum Shakin' spældi, verða send út sum dupult stakfløga 13. juni.

## Teitur og Høgni í Gimle

Teitur Lassen og Høgni Lisberg fara hóskvøldið klokkan 21.00 á pallin í Gimle í Roskilde. Hetta eigur ikki at verða blandað við hitt millum føroyingar víðagitna Gimle á Islandsbrygge. Gimle hevur í nógv ár verið eitt tað best umtókta spælistaðið í Roskilde, og nú fara tveir av fremstu før-oysku sangarum og sangskrivarum á pallin har.

**-nud**